# Hans Fróði skal venja LÍF

**Leirvíkingar ætla at bjóða seg fram í kappingini um at flyta upp úr næstbestu deildini, og fyri at røkka tí málinum halda teir tað vera neyðugt at fáa royndar menn at hjálpa til**

LÍF
*Jóannes Hansen*



*Nú hava leirvíkingar eisini meldað seg í stríðið, tá tosast skal um uppflyting. Hans Fróði Hansen og Gert Langgaard skulu báðir styrkja um hópin komandi kappingarár*

Seinnu árini hevur tað sæð út sum um, at LÍF hevur verið taparin í tøttu kappingini í fótbóltinum í Eysturoy. Sjey feløg úr Eysturoy fara komandi ár at vera við til at mynda Formula-deildina, og tá ið LÍF í fjør noyddist at stríðast fyri at varðveita plássið í næstbestu deildini, kundi tað sæð út sum um, at leirvíkingum ikki var lagað at kappast, har tað er mest spennandi.

Men í LÍF hava teir ikki givið skarvin yvir. Hans Fróði Hansen er settur sum spælandi venjari í 2006, og tað ljóðar, at fleiri spælarar afturat eru á veg til Leirvíkar. Millum hesar sigst Gert Langgaard vera.

Felags fyri Hans Fróða Hansen og Gert Langgaard er, at teir eru leirvíkingar, at teir nógvu tey fyrstu árini spældu við LÍF, og at teir síðani hava roynt seg í øðrum feløgum. Gert hevur í mong ár spælt við NSÍ, og Hans Fróði hevur roynt seg í HB, B68 og í íslendskum fótbólti, har hann í ár var kosin besti spælari í Kópavági, sum vann næstbestu deildina sannførandi.

Jógvan Júst Olsen, formaður í LÍF, váttar, at teir hava gjørt avtalu við Hans Fróða Hansen um, at hann skal verða spælandi venjari næsta ár.

- Mitt í hesi vikuni fara vit at kunngera meiri um, hvørjir spælarar fara at spæla við LÍF næsta ár. Vit hava fleiri ungar og dugnaligar spælarar. Trupulleikin hevur tó verið, at teir hava ikki royndirnar, sum eru so neyðugar at hava á einum liði. Tí arbeiða vit við at styrkja um liðið við einum fýra royndum spælarum. Tíbetur eru leirvíkingar sera áhugaðir í felagnum, og tað er nógv fótbóltsprát í bygdini. Eitt nú verður prátað um, at Gert Langgaard skal spæla við okkum. Vit hava ikki gjørt nakra formliga avtalu við Gert, men tað kann væl vera, at hann verður partur av liðnum, og um so verður, so høvdu vit verið fegnir um tað, sigur LÍF formaðurin.

Jógvan Júst Olsen sigur, at hann ongantíð áður hevur upplivað, at spælarar hava spurt seg fyri um møguleikan at spæla við LÍF soleiðis, sum fleiri hava gjørt nú í heyst.

- Umstøðurnar hjá okkum eru góðar. Vøllurin er nýggjur, og vit hava gjørt felagshúsini av nýggjum í ár. Tá ið tað so fréttist, at vit arbeiða við at spenna okkum eitt sindur út upp undir næsta kappingarár, so eru øll hesi viðurskiftini kanska orsøk til, at spælarar spyrja seg fyri her. Vit hava verið noyddir at gera upp við okkum sjálvar, hvat vit vilja. Onnur feløg vita sjálvandi, at vit eiga evnaríkar ungar spælarar, og tað eru ofta boð eftir teimum. Tá ið tað nú er greitt, at vit ætla at styrkja um liðið, og at Hans Fróði Hansen verður spælandi venjari, hava ungu menninir gjørt av eisini næsta ár at spæla við okkum, sigur LÍF formaðurin, sum er pápi U 19 landsliðsspælaran Andreas Lava Olsen. Tað er eingin loyna, at fleiri feløg í fleiri ár hava víst áhuga fyri at fáa unga mannin millum sínar spælarar.

Á fundinum, sum FSF nevndin og feløgini høvdu leygardagin, varð eitt nú tosað um, at tvey feløg næsta ár skulu flyta niður úr bestu deildini og tvey upp úr næstbestu deildini, og at endaspælið um eitt pláss í bestu deildini harvið skal strikast.

- Avgerðin um hetta verður tikin av aðalfundinum, sum verður nakað eftir ársskiftið. Vit eru fyri, at ásetingarnar verða broyttar. Undir øllum umstøðum verður kappingin í næstbestu deildini tøtt, tí tað tykjast at vera fleiri, sum arbeiða nógv við at fyrireika seg, staðfestir Jógvan Júst Olsen, formaður í LÍF.

# FCK kiksaði í Parkini

**Tað tódnaði millum tey bæði oddaliðini úr høvuðsstaðnum, og á heimavølli var Horsens verjan ikki so tøtt, sum hon plagar at vera**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Eftir eitt langt og gott summar er tað rættuliga vorðið heyst í Danmark. Men tað vil ikki siga tað sama sum at teir eru givnir at spæla fótbólt. Ikki í bestu deildini í hvussu so er. Har var 18. umfarið á skránni í vikuskiftinum, og har fara teir eisini at spæla fótbólt tvey tey næstu vikuskiftini. So verður vetrarsteðgur inntil mitt í mars.

Alt bendir á, at FCK fer at halda vetrarfrí á fremsta plássinum. Men sunnukvøldið mistu teir óvæntað tvey stig á heimavølli, tá ið AGF vitjaði í Parkini, og nú er fjarstøðan aftur til Brøndby minkað til fýra stig.

Álvaro Santos legði FCK á odda, tá ið ein hálvur tími var farin. Hann hevði góðan møguleika at økja um leiðsluna. Tað eydnaðist ikki, og í 2. hálvleiki javnaði Johnny Hansen fyri AGF, sum spældi nógv meiri álopskent, enn flestu feløgini plaga at gera, sum vitja í Parkini.

Longu leygardagin vann Brøndby á heimavølli 1-0 á Viborg, sum er á triðja plássi. Sigurin bar við sær, at Viborg nú er fimm stig aftanfyri Brøndby. Málið skoraði álopsspælarin Morten Skoubo, sum leingi hevur verið skaddur.

OB er á fjórða plássinum, og tað var eingin slingur í valsinum, tá ið teir vóru í Haderslev. Rógvi Jacobsen var ikki partur av liðnum hjá SønderjyskE. Føroyski landsliðsspælarin hevur brákað eitt rivjabein. SønderjyskE fekk fyrsta málið, men OB skoraði trý mál eftir átta minuttum, og so høvdu teir við 3-1 leiðslu í hálvleikinum lagt lunnar undir 4-2 sigur.

Hjá FC Nordsjælland hevur tað gingið væl í heyst, men hesa ferð hilnaðist tað ikki væl. AaB vitjaði í Farum, og hóast Súni Olsen ikki var førur fyri at spæla, tí hann hevur brotið beinið, so gekk tað aftur hesa ferð væl hjá AaB. Næstsíðst vunnu teir 3-0 á Brøndby, og teir vóru væl nøgdir, tá ið teir fóru úr Farum við 1-0 sigri. Eftir at tað leingi í summar og fyrr í heyst tóktist vera meiri skinklandi, so hevur tað nú hilnast væl, og nú er AaB í hvussu so er komið undan hóttanini av at flyta niður.

Silkeborg var leingi illa statt, men eisini hjá teimum hevur gongdin verið góð seinastu ferðirnar. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Esbjerg, sum tað heldur ikki hevur gingið nakað serligt hjá. Silkeborg vann næstseinast á FC Midtjyllandi, og hesa ferð vunnu teir 2-1 á Esbjerg. Iddi Alkhag hevur áður spælt við Esbjerg, og sunnudagin var hann ikki blíður við sínar fyrrverandi viðspælarar, tí hann skoraði bæði Silkeborg málini.

Horsens hevði undan hesum umfarinum sjey ferðir verið partur av málleysum javnleikum á heimavølli. Hjá FC Midtjyllandi hevur tað ikki gingið væl í ár, og tí varð roknað við, at tað ikki fór at verða so málríkt í Horsens, har vøllurin ikki er so góður, sum hann er manga aðra staðni í Danmark. Hann er ikki so góður, tí eingin hiti er í vøllinum.

Talan gjørdist um sanna málveitslu. FCM misnýtti tvey brotsspørk, men kortini vunnu teir 4-3. Horsens verjan var ikki at kenna aftur. Hon hevur higartil verið ógvuliga tøtt, men hesa ferð fóru fleiri mál ígjøgnum, enn tað eru farin í nøkrum av teimum undanfarnu seytjan umførunum. Spurningurin er, um ein av orsøkunum var, at Johan Byrial Hansen, sum annars hevur verið fastur maður í vinsta borði, hesa ferð sat uttanfyri, tí hann var leikbannaður.

## Danska Sas-ligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK (M) | 18 | 13- 4 - 1 | 35 | 12 | 23 | 43 |
| 2 | Brøndby (S) | 18 | 12- 3 - 3 | 37 | 17 | 20 | 39 |
| 3 | Viborg | 18 | 10- 4 - 4 | 33 | 20 | 13 | 34 |
| 4 | OB | 18 | 8 - 5 - 5 | 28 | 20 | 8 | 29 |
| 5 | FC Nordsj. | 18 | 6 - 7 - 5 | 28 | 21 | 7 | 25 |
| 6 | AaB | 18 | 6 - 6 - 6 | 24 | 22 | 2 | 24 |
| 7 | Silkeborg | 18 | 5 - 5 - 8 | 16 | 26 | -10 | 20 |
| 8 | FCM | 18 | 5 - 5 - 8 | 24 | 35 | -11 | 20 |
| 9 | Esbjerg | 18 | 5 - 4 - 9 | 22 | 28 | -6 | 19 |
| 10 | AC Horsens | 18 | 2 - 9 - 7 | 11 | 24 | -13 | 15 |
| 11 | AGF | 18 | 2 - 7 - 9 | 24 | 39 | -15 | 13 |
| 12 | SønderjyskE | 18 | 3 - 3 -12 | 23 | 41 | -18 | 12 |

Føroyskir leikarar: Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Súni Olsen (Aab), Rógvi Jacobsen (SønderjyskE)

## Enska Premier League

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 13 | 11- 1 - 1 | 31 | 7 | 24 | 34 |
| 2 | Wigan | 12 | 8 - 1 - 3 | 15 | 8 | 7 | 25 |
| 3 | Manchester Utd. | 12 | 7 - 3 - 2 | 19 | 12 | 7 | 24 |
| 4 | Arsenal | 12 | 7 - 2 - 3 | 19 | 10 | 9 | 23 |
| 5 | Bolton | 12 | 7 - 2 - 3 | 14 | 11 | 3 | 23 |
| 6 | Tottenham | 13 | 5 - 6 - 2 | 14 | 9 | 5 | 21 |
| 7 | Manchester City | 13 | 6 - 3 - 4 | 15 | 11 | 4 | 21 |
| 8 | West Ham | 12 | 5 - 4 - 3 | 16 | 11 | 5 | 19 |
| 9 | Liverpool | 11 | 5 - 4 - 2 | 12 | 8 | 4 | 19 |
| 10 | Charlton | 12 | 6 - 1 - 5 | 17 | 17 | 0 | 19 |
| 11 | Middlesbr. | 13 | 5 - 3 - 5 | 18 | 18 | 0 | 18 |
| 12 | Blackburn | 13 | 5 - 3 - 5 | 15 | 15 | 0 | 18 |
| 13 | Newcastle | 13 | 5 - 3 - 5 | 12 | 13 | -1 | 18 |
| 14 | Fulham | 13 | 3 - 3 - 7 | 14 | 19 | -5 | 12 |
| 15 | Aston Villa | 13 | 3 - 3 - 7 | 13 | 22 | -9 | 12 |
| 16 | WBA | 13 | 3 - 2 - 8 | 13 | 22 | -9 | 11 |
| 17 | Portsmouth | 13 | 2 - 4 - 7 | 11 | 18 | -7 | 10 |
| 18 | Everton | 12 | 3 - 1 - 8 | 4 | 16 | -12 | 10 |
| 19 | Birmingham | 12 | 1 - 3 - 8 | 7 | 17 | -10 | 6 |
| 20 | Sunderland | 13 | 1 - 2 -10 | 12 | 27 | -15 | 5 |

Føroyskir leikarar: Ingi Højsted (Birmingham)

## Enska League Championship

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sheff Utd. | 19 | 14- 3 - 2 | 40 | 17 | 23 | 45 |
| 2 | Reading | 19 | 13- 5 - 1 | 40 | 17 | 23 | 44 |
| 3 | Watford | 19 | 10- 5 - 4 | 33 | 22 | 11 | 35 |
| 4 | Leeds | 18 | 8 - 6 - 4 | 23 | 18 | 5 | 30 |
| 5 | Wolverhampt. | 19 | 7 - 7 - 5 | 26 | 18 | 8 | 28 |
| 6 | Burnley | 19 | 8 - 4 - 7 | 27 | 23 | 4 | 28 |
| 7 | Luton | 19 | 8 - 4 - 7 | 27 | 27 | 0 | 28 |
| 8 | Stoke | 19 | 9 - 1 - 9 | 22 | 26 | -4 | 28 |
| 9 | Cardiff | 19 | 7 - 6 - 6 | 29 | 22 | 7 | 27 |
| 10 | Crystal Pal. | 17 | 8 - 3 - 6 | 20 | 20 | 0 | 27 |
| 11 | Southampton | 18 | 5 -10-3 | 22 | 17 | 5 | 25 |
| 12 | Preston | 19 | 5 -10-4 | 21 | 19 | 2 | 25 |
| 13 | QPR | 19 | 6 - 6 - 7 | 21 | 26 | -5 | 24 |
| 14 | Ipswich | 19 | 6 - 6 - 7 | 22 | 28 | -6 | 24 |
| 15 | Norwich | 19 | 6 - 4 - 9 | 19 | 24 | -5 | 22 |
| 16 | Leicester | 18 | 4 - 8 - 6 | 16 | 19 | -3 | 20 |
| 17 | Plymouth | 18 | 4 - 7 - 7 | 16 | 23 | -7 | 19 |
| 18 | Sheff Wed | 19 | 4 - 7 - 8 | 17 | 25 | -8 | 19 |
| 19 | Crewe | 19 | 4 - 7 - 8 | 22 | 34 | -12 | 19 |
| 20 | Derby | 19 | 3 - 9 - 7 | 25 | 31 | -6 | 18 |
| 21 | Coventry | 19 | 3 - 9 - 7 | 22 | 29 | -7 | 18 |
| 22 | Hull | 19 | 4 - 6 - 9 | 15 | 22 | -7 | 18 |
| 23 | Brighton | 19 | 2 -10-7 | 19 | 28 | -9 | 16 |
| 24 | Millwall | 19 | 2 - 7 -10 | 15 | 32 | -17 | 13 |

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)